# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo






*Stórur áhugi er fyri at gita samankroysta bilin í SMS*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Kroystur bilur í SMS

Á Torginum í SMS er ein samankroystur bilur, har møguleiki er hjá teimum vitjandi, at gita hvat slag bilurin er. Tey, sum gita rætt, eru við í kappingini um eitt gávubræv upp á 3.000 krónur frá handlunum í SMS og eitt árshald av Sosialinum.

Bilurin var settur í SMS fríggjadagin 5. og verður har til og við leygardagin 13. november. Stórur áhugi er fyri at gita samankroysta bilin í SMS. Leygardagin høvdu yvir túsund vitjandi gitt hvat slag bilurin var. Tað eru SMS og Sosialurin, sum skipa fyri kappingini.



*Magnus Gøðnason og Sigurjón Magnússon frá íslendsku verksmiðjuni og Fríðálvur Bláhamar frá Vestmanna Sløkki- og Bjargingarliði*

# Vestmenningar nýggjan bjargingarbil

Vestmanna Sløkki- og Bjargingarlið hevur fingið nýggjan bjargingarbil. Talan er um ein Mercedes Benz Sprinter, sum er bygdur um til ein kombineraðan manskaps- og útgerðarbil hjá Sigurjón Magnússon í Íslandi. Í bilinum er pláss til 9 persónar, umframt at eitt rúm er til útgerð hjá sløkki- og bjargingarliðnum.

Hósdagin 11. november kl. 17.15

Í sendingini Vinnu- & Bilradio er ein samrøða við Fríðálv Bláhamar frá Vestmanna Sløkki- og Bjargingarliði um nýggja manskaps- og útgerðarbilin, sum er uppbygdur í Íslandi.

Í sambandi við at fyritøkan Blika í Havn nú umboðar handilsfyirtøkuna Berner, sum selur vørur beinleiðis til verkstaðir og handverkarar kring landið, er ein samrøða við Steven Thingholm, sølukonsulent hjá Berner í Danmark

Eisini er samrøða við Hilmar Johannesen í Havn, sum fortelur um sítt arbeiðslív sum bilsmiður, brandmaður og eykapolitistur.




Vinnu- & bilradio á Rás 2